# Býráðið

**Dagfesting:** 23.06.2022 kl. 19:00
**Málnr.:** 22/00084

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Gudny Vang, Magni Jøkladal, Ólavur Larsen

Varalimir: Lilian Jacobsen

Ikki møtt: Avboð frá Ólavi Larsen

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

**Málsyvirlit**

**Til støðutakan** 1

| | | |
|---|---|---|
| 21/22 | 20/00338-3 | Havsbrún - Umsókn um principielt byggiloyvi til "Fóðurlinju 3"_Nevndarviðgerð |
| 22/22 | 22/00118-5 | Umsókn um byggiloyvi til útbygging av matr. nr. 149 á Ennivegi 65 |
| 23/22 | 20/00111-7 | - Umsókn um marknaumskipan Arkivmál 19/00317 og 19/00382 |
| 24/22 | 22/00344-2 | Fíggjarnevndarviðgerð av gjaldførinum í Fuglagjarðar kommunu 2022 |
| 25/22 | 22/00248-4 | Endurskoðan av fíggjarjáttan fyri 2022 |
| 26/22 | 22/00353-1 | Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfund 23. juni 2022 |
| | | |

**Til støðutakan**

## 21/22
## 20/00338-3 Havsbrún - Umsókn um principielt byggiloyvi til "Fóðurlinju 3"_Nevndarviðgerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 10.05.2022 | 21/22 |
| 3 Býráðið | 12.05.2022 | 18/22 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 16.06.2022 | 25/22 |
| 5 Býráðið | 23.06.2022 | 21/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu og havnanevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsókn frá Havsbrún dagf. 30. juni 2020 um byggiloyvi til Fóðurlinju 3.<br>Bygningurin er staðsettur í heimara enda á verandi fóðurgoymslu II á matr. nr. 239ac. Byggingin umfatar ein bygning b*l*h= 37,00*24,80*35,00 m, til maskinútgerð til fóðurframleiðslu, og ein bygning b*l*h= 6,8*14,15*23,6 m til maskinútgerð til avsekking.<br><br>Ásetingar í byggisamtyktin fyri havnaøkið eru hesar<br><br>1. Økið verður lagt av til havnarøki endamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu.<br><br>2. Byggistigið fyri havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,8. Hæddir á húsum skulu verða settar í hvørjum einstøkum føri út frá heildarmeting av nýtslu og skapi. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | 3. Í niðastu hædd er ikki loyvt at inrætta skrivstovur, umklæðingarrúm, matstovur, køk, o. t..<br><br>4. Inn frá sunnara parti á havnarøkinum verða goymsluhallir gjørdar inni í fjallinum.<br><br>5. Bygging má ikki verða nærri bryggjutrom enn 15 m. Tá serligar orsøkir tala fyri hesum, kunnu smærri bygningar til serstaka pumpu-, krana- og flutningsútgerð verða nærri bryggjutrom enn 15 m.<br><br>6. Mest loyvda hædd á bygningum er 15 m. Tá serligar orsøkir tala fyri tí, kunnu silobygningar, goymslutangar og bygningar til serstaka maskinútgerð á økinum frá Kirkjuryggi og suðureftir, sum krevja meira hædd og sum strekkja seg yvir eitt ávíst lutvís minni øki verða hægri enn 15 m.<br><br>Verandi havnaøki sunnanfyri Kirkjuryg er umleið 80.000 m2. Verða ætlaðu 8 siloir og fyriliggjandi Fóðurlinja 3 bygd samb. fyriliggjandi ætlan, verður samlaða byggistigið á bygningum, sum eru hægri enn 15 m, á økinum sunnanfyri Kirkjurygg umleið 0.08, har ásetta byggistigið er 0.8. Samlaða byggistigið verður ikki ávirkað av hesi bygging.<br><br>Mett verður tí, at ætlaða byggingin viðv. Fóðurlinju 3 er innanfyri ásetingar í grein 6 ásetingunum fyri havnaøkið. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Tá bygningurin viðv. Fóðurlinju 3 verður mettur at verða innanfyri ásetingarnar í byggisamtyktini, verður mælt til, at treytað byggiloyvi verður givið, soleiðis at arbeiðast kann fram ímóti, at bygt verður sambært fyriliggjandi ætlan, og at ásetingar um brunakrøv, sum byggimynduleikin kann góðtaka, verða yvirhildin. Í hesum sambandi verður heitt á Havsbrún at nýta serfrøðingar í brunatrygd sum ráðgeva.<br><br>Atlit til útsjónd og lit skulu takast til bygningin, sum kommunan kann góðtaka.<br><br>Onki tilfar skal verða sett í ordra, og einki arbeiði skal verða sett í verk, áðrenn endaligt byggiloyvi er givið av býráðnum.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 10 mai 2022**<br>Fuglafjarðar kommuna móttikið ískoytisumsókn til prinsipiella byggiloyvið, sum varð útskrivað 31. august 2020.<br><br>Havsbrún hevur í ískoytisumsókknini lagt áherðslu á at fáa útjóndina á Fóðurlinju 3 so góða sum tilber, har arkitektar eru á einum máli um, at bygningurin tekur seg munandi betri út sambært ískoytisumsókknini í mun til treytaða byggiloyvið frá 31. august 2020.<br>Víst verður til ískoytisumsókn, dagfest 13. apríl 2022 við tilhoyrandi tekningum og myndum.<br><br>**Ískoytisbyggiloyvi inniber fylgjandi**<br>1. Takið norðureftir verður lyft 4 m longur upp<br>2. Takið suðureftir verður lyft 3 m longur upp<br>3. Brandtrappan millum avsekkingarbygningin og Fóðurlinju 3 verður innilokað við glasi<br>4. Ein karnappur verður bygdur út úr fasaduni, sum vendir eystureftir<br><br>Tekniska deild hevur gjøgnumgingið ískoytisumsóknina til treytaða byggiloyvi hjá Havsbrún til Fóðurlinju 3.<br><br>Umsóknin um ískoytisbyggiloyvi til treytaða byggiloyvi frá 31. august 2020 liggur innanfyri tær ásetingar í byggisamtyktini, sum eru galdandi fyri økið merkt D, norðanfyri Kirkjurygg.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 16. juni 2022**<br>Í sambandi við, at Havsbrún fer at seta hol á verandi tekjur á umkringliggjandi bygningum, og rudda sló fyri nýggja bygninginum, "Fóður linja 3", so hevur Tekniska deild móttikið tekniskt tilfar í sambandi við brunakrøv. Tað er brunaætlan, |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | dagfest 9. juni 2022, og brunatekningar, dagfestar 6. juni 2022. Víst verður til FK j. nr. 20/00338-29.<br>Ein fundur hevur verið við byggiharran og ráðgevararnar hjá byggiharranum, har brunaætlan og brunatekningar vóru gjøgnumgingnar.<br>Tekniska deild hevur saman við brunaráðgeva og tilbúgvingarleiðara gjøgnumgingið innsenda tilfarið frá brunaráðgevanum.<br>Byggiharrin hevur sett ein brunaserfrøðing at loysa tey brunatekniskú krøvini, sum var eitt av tilmælunum frá Fuglafjarðar kommunu.<br>Brunaráðgevin fær sær vegleiðing frá DBI (Dansk Brandinstitut) og – RMG- gruppen í Danmark.<br><br>Tekniska deild hevur viðgjørt brunaætlanina og brunatekningarnar saman við tilbúgvingarleiðaranum og einum brunamálsviðgera, sum hevur førleikar og útbúgving til tess.<br>Viðmerkingarnar eru sendar til arbeiðstakaran, sum er P/f Articon. Ein fundur hevur verið 15. juni hjá byggiharranum Havsbrún, har tekniska deild greiddi arbeiðstakara, byggiharranum og ráðgevum frá viðmerkingunum.<br><br>Ráðgevarar og arbeiðstakari hava rættað brunaætlanina og tekningarnar, og tilfarið er sent inn av nýggjum til teknisku deild. Brunaætlanin og tekningar eru viðheftar í málslýsingina.<br><br>**Fóðurlinja 3**<br>Bygningurin er í 7 hæddum, og er talan um eina brunaeind. Talan er um eina BS 120 konstruktión, har takkonstruktiónin er BD 60, og tað berandi elementið í tekjuni er BS 60.<br>Bygningurin hevur sprinkling ABS, ABA-anlegg, har ABA sentralurin verður staðsettur í samráð við tilbúgvinarleiðaran, og møguliga ein undir ABA-sentralur, sum verður bundin í hinar bygningarnar á staðnum. Ein ávaringarskipan sum hevur ljóð og ljós, verður sett upp.<br>Bygningurin hevur tvær trappukjarnir, so sleppast kann trygt út úr bygninginum niður á lendið og út, og fyri at brandfólk sleppa inn í bygningin at sløkkja. Í mesta lagi eru 25 m til rýmingarleiðir.<br>Samlingsstøðini eru Fóðurkain og økið uttanfyri høvuðsskrivstovuna. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Talvu- og edvrúm verða ikki sprinklaði, men køvt við t.d. Argon, so iltin kemur niður á 14 %. Hetta er ikki eitt mynduleikakrav, men byrriharrin ynskir hetta.<br><br>Nøkur rúm hava skrivstovur, eitt opið rum, sum sæst við ávaringarskipan, og altíð tveir serskyldar rýmingarleiðir.<br><br>Goymslur verða í einum rúmi/brunaeind fyri seg sjálvan.<br><br>Bygningurin fær ein brandmanselevator, sum eisini verður nýttur til at flyta ting upp og niður við. Hetta er ein fyrimunur, tá brandfólk skulu upp og niður í sambandi við sløkking, tí brandúrbúnaðurin í sambandi við sløkking er tungt at hava uppá sær.<br><br>Eisini verða brandskáp sett upp. Greinað er, hvussu nógv fólk eru á hvørjari hædd.<br><br>Tekniska deild hevur gjøgnumgingið ískoytisumsóknina í sambandi við bruna og brunaætlan.<br><br>Brunaætlanin saman við tekningum eru innan fyri tey brunakrøv, sum verða sett til ein slíkan bygning. Um veitarin av inventar ikki kann lúka ásettu krøvini, má brunaætlanin dagførast. Statiskar útrokningar fyri bygningin, og plantekning og skurðir yvir tekniskar leiðingar, sum verður gjørdur í samráð við teknisku deild, verða sendar til teknisku deild til góðkenningar, áðrenn bygt verður.<br><br>**Nýtt ískoyti til býráðsfundin 23. juni 2022**<br>Vinnu- og havnanevndin samtykti á fundi í vinnu- og havnanevndini einmælt at geva byggiloyvi til "Fóåurlinju 3".<br>Býráðið skal taka støðu til at geva byggiloyvi til "Fóðurlinju 3" sambært innsendum tilfari, sum er brunaætlan og brunatekningar. |
| Bakgrund | **Upprunin til málið**<br>Umsókn um byggiloyvi til Fóðurlinju 3. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 20/00338-1 Havsbrúm - Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til "Fóðurlinju 3" |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">FK j. nr. 20/00338-2 Umsókn, "Fóðurlinju 3"<br>FK j. nr. 20/00338-22 Fundur við Havsbrún um evt. Ískoytisumsókn til treytað byggiloyvi til Fóðurlinju 3<br>FK j. nr. 20/00338-24 Umsókn um ískoyti til treytað byggiloyvi til Fóðurlinju 3<br>FK j. nr. 20/00338-34 P/f Articon – Dagførdar tekningar, dagfestar 16. juni 2022<br>FK j. nr. 20/00338-35 P/f Articon – Dagførd tekning, dagfest 16. juni 2022<br>FK j. nr. 20/00338-37 Havsbrún – Dagførd brandstratigi, 20. Juni 2022</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Vísandi til omanfyri nevndu frágreiðing í nevndartekstinum, verður mælt til, at treytað byggiloyvi verður givið sambært fyriliggjandi umsókn, og at málið verður beint víðari í býráðið til støðutakan.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 10. mai 2022<br>Tekniski leiðarin mælir til at geva treytað byggiloyvi til fóðurlinju 3 sambært ískoytisumsókn, dagfest 13. apríl 2022, og at málið verður beint víðari í býráðið til støðutakan.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 16. juni 2022<br>Tekniski leiðarin mælir til at geva byggiloyvi til "Fóðurlinju 3" sambært brunaætlan, dagfest 16. juni 2022, og brunatekningum, dagfestar 16. juni 2022, og at byggiharrin sendir inn statiskar útrokningar í sambandi við bygningin, og plantekning og skurðir yvir tekniskar leiðingar, sum verða gjørdar í samráð við tekisku deild, áðrenn byggingin byrjar. Um veitarin av inventar ikki kann lúka ásettu krøvini, má brunaætlanin dagførast, og at málið verður beint víðari í býráðið til støðutakan.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 23. juni 2023<br>Kommunustjórin og tekniski leiðarin mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá vinnu- og havnanevndini 16. Juni 2022 um at geva Havsbrún "Treytað byggiloyvi" til verkætlanina "Fóðurlinja 3", til niðurtøku, dagføring og nýgerð av bygningum, soleiðis at arbeiðast kann víðari við málinum, og at brunatekningar, fullfíggjaðar tekningar og áðurnevndar treytir av byggjarínum skjótast gjørligt verður at senda til Fuglafjarðar kommunu til góðkenningar.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">15. juli 2020.</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | 10. mai 2022.<br>23. juni 2022. |

**Vinnu- og havnanevndin 17. juli 2020**
Ein samd nevnd mælir til omanfyri nevnda tilmæli.

**Vinnu- og havnanevndin 10. maj 2022:**
Ein meiriluti í nevndini tekur undir við tilmælinum um at geva treytað byggiloyvi til fóðurlinju 3 sambært ískoytisumsókn, dagfest 13. apríl 2022, og at málið verður beint víðari í býráðið til støðutakan.

**Býráðið 12. maj 2022:**
Meirilutin í býráðnum avgjørdi við 7 stemmum fyri og 2. ímóti at geva treytað byggiloyvi til fóðurlinju 3 sambært ískýtisumsókn, dagfest 13. apríl 2022.

**Vinnu- og havnanevndin 16. juni 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 23. juni 2022:**
Býráðið samtykti við atkvøðugreiðsluni 8 fyri og ein blonk, at taka undir við tilmælinum um at geva Havsbrún "Treytað byggiloyvi" til verkætlanina "Fóðurlinja 3", til niðurtøku, dagføring og nýgerð av bygningum, soleiðis at arbeiðast kann víðari við málinum, og at brunatekningar, fullfíggjaðar tekningar og áðurnevndar treytir av byggjarínum skjótast gjørligt verður at senda til Fuglafjarðar kommunu til góðkenningar. Sonni á Horni atkvøddi blankt.

8

## 22/22
## 22/00118-5 Umsókn um byggiloyvi til útbygging av matr. nr. 149 á Ennivegi 65

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.06.2022 | 42/22 |
| 2 Býráðið | 23.06.2022 | 22/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tekniska deild hevur fingið umsókn um byggiloyvi til útbygging av sethúsi á matr. nr. 149, Ennivegur 65, FO 530 Fuglafjørður. Tilbygningurin er nærri enn 5 m frá grannahúsunum, og tískil er neyðugt at leggja málið fyri teknisku nevnd sum eitt frávik.<br><br>Umsøkjarin hevur fingið grannaváttan í sambandi við umsókn um byggiloyvi við fráviki.<br><br>**Nýtt ískoyti til fundin í býráðnum 23. juni 2022**<br>Umsóknin um byggiloyvi við fráviki varð viðgjørd á fundi í teknisku nevnd 9. juni 2022, har nevndi samtykti at ganga umsóknini við trimum frávikum, har tað eina er, at bygningurin kemur nærri grannamarki enn 2,5 m eystureftir ímóti matr. nr. 122a, nærri marki norðureftir ímóti matr. nr. 151, og at hæddin á bygninginum er yvir 2,5 m. Umsøkjarin hevur fingið tilsøgn um at keypa matr. nr. 122a frá eigaranum.<br>Býráðið skal taka støðu til, um gevast skal byggiloyvi sambært umsókn um frávik, og at tekniska deild skipar fyri grannahoyring um frávik. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Umsókn um byggiloyvi til uppíbygging sum frávik frá verandi byggisamtykt. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 22/00118-1 Umsókn um byggiloyvi til uppíbygging til verandi sethús | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Nei |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at umsøkjarin broytir tekningarnar, soleðis at byggingin er í samsvar við verandi byggisamtykt.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum 23. juni 2022**<br>Tekniska nevnd mælir býráðnum at taka undir við samtyktini í teknisku nevnd 9. juni 2022 um at geva byggiloyvi við fráviki sambært innsendum tekningum, treytað av at grannahoyringin verður góðkend, sum tekniska deild skipar fyri. | | |
| Dagf | 9. juni 2022. | | |

**<u>Tekniska nevnd 09. juni 2022:</u>**
Nevndin tekur undir við at geva byggiloyvið eftir innsendum tekningum sambært umsókn um frávik, og at málið verður lagt fyri býráðið.

**<u>Býráðið 23. juni 2022:</u>**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd við tí ískoyti at tað eisini er samtykt frávik í nýtslustiginum. 10

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

**23/22**
**20/00111-**  **Umsókn um marknaumskipan**
**Arkivmál 19/00317 og 19/00382**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 3 Tekniska nevnd | 23.06.2021 | 60/21 |
| 4 Tekniska nevnd | 09.06.2022 | 50/22 |
| 5 Býráðið | 23.06.2022 | 23/22 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Fuglafjarðar kommuna hevur fingið áheitan um at taka málið um marknaumskipanina upp av nýggjum. Umsitingn hevur havt fund við m málið.<br><br>**Ískoyti**<br>Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til loysn. Víst verður til plantekning og 3D-tekning. Eisini hevur umsitingin gjørt eina kostanaðarmeting sambært tekningum.<br>Uppskotið tekur støði í at gera eina laðing framvið áarbakkanum við einum moldskráa millum verandi laðing og nýggju laðingina. Eisini er ein grótlaðing framvið p-økinum í niðara borð og niðan við omankoyringini. Ein grótlaðing gongur vinkulrætt inn ímóti bilhúsinum, hetta fyri at lyfta økið eitt sindur upp. Uppskotið leggur upp til at fáa atgongd oman á sandin við bili. Eisini ber til at sleppa oman á sandin við einum bátavogni til kajakkir t.d.<br>Tá økið liggur so nær ánni, so mælir umsitingin til at omankoyringin ikki verður asfalterað, men at t.d. græsarmering verður gjørd ístaðin.<br>Svenning er kunnaður um uppskotið og tekur undir við tí.<br><br>**Ískoyti til fundin 21. Juni**<br>Umsitingin hevur saman við formanninum í teknisku nevnd umrøtt málið av nýggjum.<br>hevur í umbúna at gera sethúsini í stand, og økið norðanfyri sethúsini er tenkt at hesum øki. Talan er um atkomuligheit til húsini og hjallarin í eini lon, sum gongur oman ímóti sandinum.<br>Núverandi eigari av matr. nr. 170a er<br>hevur sterkt ynski um at keypa lendi frá og hava teir báðir lati umsókn inn til Umhvørvisstovuna um sundurbýti. |

Niðurstøðan á fundinum við eigaran av matr. nr. 749b er tann, at kommunan viðmælir keypið millum og at kommunan kemur at hava tinglýstan avgerðar- og átælurætt, hvat fer fram á økjinum, tí hetta er avlagt til fríøki, og greinsar ímóti Gjógvará.
Tosa hevur verið um at fríðka økið bæði av og Fuglafjarðar kommunu, tí økið liggur so tærr uppat Gjógvará. Her kundi ein felagsloysn verði góð.

**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 9. juni 2022**
Eigarin av matr. nr. 765, Fuglafjørður, hevur gjørt avtalu um at keypa matr. nr. 170a, Fuglafjørður.
Svar er komið aftur frá Umhvørvisstovuni, at tá matr. nr. 170a liggur í tveimum byggisamtyktum, so ber ikki til at selja matr. nr. 170a, tí tað økið er partur av einum størri øki.
Um Eigarin av matr. nr. 765 skal kunna keypa matr. nr. 170a millum matr. nr. 765 og ánna, so má økið broytast til B-øki.
Um økið skal broytast til B-øki, so má ein serstøk byggisamtykt gerast fyri hendan matrikul við tinglýstum treytum, og sum inniheldur somu ásetingar sum verandi fríøki, tí meginparturin av stykkinum liggur í fríøki.

**Ískoyti til býráðsfundin 23. juni 2022**
Eftir fundin í teknisku nevnd 9. Juni, so hevur umsitingin arbeitt miðvíst við málinum, fyri at finna eina haldbara loysn.
Um málið um marknaumskipan av parti av matr. nr. 170a skal koma á mál, so er neyðugt at broyta byggisamtyktina frá fríøki I til B-øki, fyri tann partin, sum ynski er um at leggja afturat matr. nr. 765. Talan er um 117 fermetrar av samlaðu víddini á 166 fermetar. Restin av matr. nr. 170a verður fríøki, merkt I, sum tað er í dag, og verður økið ogn hjá Fuglafjarðar kommunu, umleið 49 fermetrar.

| | |
|---|---|
| Bakgrund | Fáa fleiri p-pláss og fáa omankoyring til bilhúsið. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin<br>BK 17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 20/00111-8 Fundarfrásøgn frá fundi millu. og umboð fyri Fuglafjarðar kommunu<br>FK j. nr. 20/00111-11 Uppskot til loysn_3D-tekning saman við eini kostnaðarmeting |

**Viðgerð**

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðari mælir til, at umsitingin ger eitt uppskot til loysn, og at fær brúksrætt til økið, soleiðis at hann fær atkomu til kjallarahæddina í úthúsinum norðureftir, og at kommunan keypir lendið frá<br><br>**Nýtt tilmæli**<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við uppskotinum til loysn.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin 21. Juni 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at viðmæla eina marknaumskipan í sambandi við, a. keypir matr. nr. 170a frá og at kommunan kemur at hava tinglýstan avgerðar- og átæluræætt, hvat fer fram á økjinum, matr. nr. 170a, Fuglafjørður. Tvs. at kommunan skal góðkenna broytingar á matr. nr. 170a í mun til økið, sum tað sær út í dag.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 9. Juni 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir til at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 170a, tvs. at fríøkið verður broytt til B, soleiðis at eigarin av matr. nr. 765 kann keypa stykkið, matr. nr. 170a, f: og at kommunan kemur at hava tinglýstan avgerðar- og átælurætt, hvat fer fram á økjinum, matr. nr. 170a, Fuglafjørður. Tvs. at kommunan skal góðkenna broytingar á matr. nr. 170a í mun til økið, sum tað sær út í dag.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 23. juni 2022**<br>Tekniski leiðarin mælir til at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 170a, umleið 117 fermetar frá fríøki I til B-øki, og at leggja hendan partin afturat matr. nr. 165, Fuglafjørður, og restin av matr. nr. 170a, umleið 49 fermetrar, verður ogn hjá Fuglafjarðar kommunu, og verður at leggja saman við matr. nr. D. | | |
| Dagf | 17. november 2020.<br>14. desember 2020.<br>23. juni 2021.<br>9. juni 2022. | | |



**<u>Tekniska nevnd 17. november 2020</u>**

Nevndin tekur einmælt undir við tilmælinum. Nevndin ynskir at fáa gjørt eitt uppskot áðrenn næstkomandi fund.

**<u>Tekniska nevnd 14. december 2020:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum. Tá matrikulloysnin er endalig, verður farið undir at fríðka og skipa økið á kommunala partinum.

**<u>Tekniska nevnd 23. juni 2021:</u>**
Nevndin samtykti at viðmæla at keypa lendið frá , matr. nr. 170a, Fuglafjørður, og at kommunan fær tinglýstan avgerðar-, ræðis- og átalurætt yvir økinum, tí økið er eitt fríøki.

**<u>Tekniska nevnd 09. juni 2022:</u>**
Nevndin samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við málinum, hvørjar loysnir bera á mál.

**<u>Býráðið 23. juni 2022:</u>**
Býráðið tók einmælt undir við, at broyta byggisamtyktina sambært tilmælinum frá tekniska leiðaranum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 25/22
## 22/00248-4 Endurskoðan av fíggjarjáttan fyri 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2022 | 21/22 |
| 2 Býráðið | 23.06.2022 | 25/22 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Tað vísir seg at kostnaðurin av at byggja nýggja skúlan og tannlæknastovuna í Fuglafirði er hægri enn upprunaliga metingin at útreiðslurna fara upp um tað í sett er av til byggingina. Harafturat verður mett at inntøkan av søluni av gomlu kommunuskrivstovuni fer at verða minni enn upprunaliga mett.<br><br>Borgarstjórin og umsitingin hava kanna møguleikan fyri at taka lán at fíggja 64-skúlan og hava fingið at vita at tað er óvist um hetta letur seg gera, so leingi skuldin hjá kommununi er omanfyri lániloftið á eina álíkning.<br><br>Tí verður neyðugt at taka rættstundis fyrivarni og gera eina útreiðsluneutrala eykajáttan har býraðið raðfestir íløgurnar av nýggjum soleiðis, at samlaða játtanin kemur at halda.<br><br>Ein fyribills uppgerð frá ráðgeva og byggileiðslu vísir, at tað koma at vænta 6.800.000 kr. í at gera skúlan og tannlæknastovuna lidna og mett verður at sølan av kommunuskrivstovuni fara at geva 1.000.000 minni enn upprunaliga mett. Tí verður neyðugt hjá býráðnum at umraðfesta 7.800.000 kr. fyri at fáa javnvág millum játtan og nýtslu.<br><br>Býráðsmeirlutin er komin við einum uppskoti til umraðfesting uppá 5.870.000 kr, sum er sent til nevndirnar at viðgera. Henda upphædd bygdi á eina misskiljing, tí ein fortreyt fyri hesi uppgerð var at øll restjáttanin á konto 411 til «64-skúlan» varð trekt frá uppgerðini frá ráðgeva og byggileiðslu.<br><br>Nevndirnar hava tikið undir við uppskotinum við smávegis viðmerkingum.<br><br>Út yvir uppskotið frá býráðsmeirlutanum verður neyðugt at finna umleið 2.000.000 kr. afturat. |

17

| | |
|---|---|
| | Møguleiki er at taka 1.000.000 kr afturat fra konto 411 Skúlin, sum hareftir hevur eina rest uppá ca. 188.000 kr. Hin milliónin kann møguliga takast frá konto 632 Kommunal útstykking.<br><br>Kannast skal sjálvsagt um tað longu eru gjørdar nakrar bindingar á hesum kontum, sum ger at umraðfestingin ikki ber til. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | At íløguútreiðslurnar til skúlabyggingina í fuglafirði eru hægri enn avsett og at minni fæst fyri sølu av gomlu kommunuskrivstovuni enn upprunaliga mett. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunulógin og Fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu 2022<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Borgarstjórin - Dávur Juul - Íløgu broytan 2022 - FK j. nr. ...<br>52/22 Samtykt Tekniska nevnd, 09.06.2022 Íløgubroytan fyri f..<br>27/22 Samtykt Mentamálanevndin, 08.06.2022 Íløgu broytan 202..<br>27/22 Samtykt Vinnu- og havnanevndin, 16.06.2022 Íløgubroyta...<br>Sv_ Nevndarmál 27_22 Íløgu broytan |

Viðgerð

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |

**Tilmæli**

Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur undir við at ger útreiðsluneutrala eykajáttan, soleiðis at javnvág verður ímillum játtan og nýtslu, sum skal leggjast fyri á fyrst komandi býráðsfundi og eftirfylgjandi býráðsfundi.

**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 23. Juni 2022**
Fíggjarnevndin og kommunustjórin mæla til eina útreiðsluneutrala eykajáttan við hesum lækkingum:

| Íløgur 2022 | Kontonr. | Eykajáttan Lækking |
|---|---:|---:|
| Mentunarhúsið | 541 | 250.000 |
| Piddasahandil | 565 | 70.000 |
| Fløtugerði | 571 | 800.000 |
| Umhvørvi og orka | 621 | 250.000 |
| Útstykking Kambsdal | 633 | 500.000 |
| Vatnveiting | 651 | 2.500.000 |
| Fuglafjarðar havn | 751 | 1.500.000 |
| Íalt | | 5.870.000 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td>Og hesum hækkingum:<br><table><tr><th>Íløgur 2022</th><th>Kontonr.</th><th>Eykajáttan Hækking</th></tr><tr><td>Søla kommunubygningur</td><td>160</td><td>1.000.000</td></tr><tr><td>Skúlin</td><td>411</td><td>4.870.000</td></tr><tr><td>Íalt</td><td></td><td>5.870.000</td></tr></table></td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td>20. juni 2022<br>23. juni 2022</td></tr>
</table>

**Fíggjarnevndin 20. juni 2022:**
Nevndin vísti á at tað ikki er nyðugt at biðja um eykajáttan til peningin sum stendur á konto 411 til skúlan, men viðmerkir at tað má steðgast við nýggjum virksemi í «64-skúla»-verkætlanini fyribils.

19

Hóast ávís óvissa er um ítøkuligu meirútreiðslurnar, so tekur nevndin undir við útreiðsluneutralu eykajáttanini fyri at binda um heilan fingur uppá 5.800.000 kr. Út yvir uppskoti hjá meirlutanum (minus 1.000.0000 av konto 411) verður 500.000 kr. flutt frá konto 651 Vatnverkið og 500.000 kr. 751 Fuglafjarðar Havn.

**Býráðið 23. juni 2022:**
Býráðið tekur við atkvøðugreisluni 5-4 undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og kommunustjóranum um útreiðsluneutrala eykajáttan. Málið skal hava eina 2. viðgerð. Sonni á Horni, Gudny Vang, Lillian Jacobsen og David Andreassen atkvøddu ímóti.

## 26/22
## 22/00353-1 Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfund 23. juni 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 23.06.2022 | 26/22 |

**Tilráðing**

20

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing av málinum | Ólavur Larsen hevur boðað kommunustjóranum frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 23. juni 2022, og tí ynskti hann tiltakslimin Lillian Jacobsen kallaðan inn til býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Lillian Jacobsen er fjórðvaldi limurin á lista Á við 40 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 23. juni gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Lillian Jacobsen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ólavur Larsen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 23. juni 2022 | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Teldubrævasamskifti við Ólavur Larsen og Lillian Jacobsen** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Lillian Jacobsen kann taka sæti í Fuglafjarðar býráð í sambandi við fundin 23. juni 2022. | | |
| Dagf | 23. juni 2022 | | |

**24/22**
**22/00344-2 Fíggjarnevndarviðgerð av gjaldførinum í Fuglagjarðar kommunu 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2022 | 23/22 |
| 2 Býráðið | 23.06.2022 | 24/22 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Dagførd uppgerð yvir gjaldføri í Fuglafjarðar kommunu vísitr at tað ikki verður møguligt at svara hvørjum sítt um ikki eyka gjaldføri verður tilført. Alternativt ber til at biðja um gjaldsskáar, men hetta verður mett at taka ov langa tíð í mun til avbjóðingarnar her og nú. Ein loysn kann eisini verða ein kombinatión av tilførdum gjaldføri og gjaldsskáum.<br><br>Viðhefta uppgerð vísir at mettu útreiðslurnar í juni mánaða verða umleið 9.700 tkr., meðan gjaldføri er umleið 7.700 tkr. So í juni mánaða koma at íresta 2.000 tkr.<br><br>Fuglafjarðar kommuna hevur pening útistandandi hjá debitorum, men tað er óvist um nakað av hesum kemur inn áðrenn útreiðsluirnar í juni skulu gjaldast.<br><br>Umsitingin metir at neyðugt verður hjá kommununi at fáa sær kassakredit skjótast gjørligt. Hvør upphæddin skal vera er ikki greiða fingin á enn og tí kundi ein loysn verið at býráðið samtykkit at tað kann takast ein kassakredittur uppá í mesta lagi 10.000 tkr., og at umsitingin arbeiðir nærri fyri at greina hvør neyvi tørvurin er fyri at avmarka útreiðslurnar til kassakredittin. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Gjaldføristrupulleikar í Fuglafjarðar kommunu medio 2022 |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>gjaldføri.msg<br>gjaldføristrupuleikar.xlsx |

15

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at umbøn um at stovna kassakreditt verður løgd fyri á komandi býráðsfundi og at umsitingin beinanvegin fer í gongd við neyðugu fyrireikingarnar.<br><br>**Tilmæli til býráðsfundin 23. Juni 2022**<br>Fíggjarnevndin og kommunustjórin mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið um at fáa kommununi ein kassakredit til vega uppá 3.000.000 kr., at nøkta bráfeingis gjaldføristørvin. | | |
| Dagf | 18. juni 2022<br>23. juni 2022 | | |

**Fíggjarnevndin 20. juni 2022:**
Fíggjarnevndin mæli býráðnum, at taka undir við at fáa ein kassakredit til vega uppá 3.0000.000 kr., til at kunna avgreiða bráfeingis skyldur. 16

**Býráðið 23. juni 2022:**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og kommunustjóranum um at skaffa ein kassakredit uppá 3.000.000 kr.

**Býráðið 23. juni 2022:**
Eitt samt býráð tók undir við at Lilian Jacobsen tók sæti á fundinum 23. juni 2022.

21

Fundurin lokin kl. 21.15

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Gudny Vang

Magni Jøkladal

Lilian Jacobsen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo